# Kunngerð

**Til løgtingsveljarar í Miðvágs kommunu til løgtingsvalið 30. apríl 2002.**

Valið fer fram í **bygdaskúlanum** í Miðvági.

**Atkvøðugreiðslan** byrjar kl. 10.00 og heldur fram til kl. 20.00 – ella so leingi veljarar møta uttan støðg.

**Veljarar**, sum sambært vallógini lúka treytirnar fyri at greiða **brævatkvøðu**, kunnu atkvøða á kommunuskrivstovuni í avgreiðslutíðini til og við mánadagin 29. apríl 2002. Tey, sum vegna sjúku ikki kunnu koma á valstaðið, kunnu velja heima. Hesi skulu boða frá á kommunuskrivstovuni tlf. 332429 í seinasta lagi mánadagin 29. apríl kl. 16.00.

**Valkort** verða send øllum teimum, sum standa á vallistanum. Um onkur, sum heldur seg hava valrætt, ikki hevur fingið valkort, skal viðkomandi boða frá á kommunuskrivstovuni í seinasta lagi mánadagin 29. apríl 2002 kl. 16.00.

**Miðvágs bygdaráð**

# Musikkskúlaskipanin

Søkir eftir lærarum til tíðaravmarkaðar setanir skúlaárið 2002/2003.

**Messinsljóðførislærara**
at undirvísa fulla tíð í Klaksvík og Leirvík.

**Sanglærara**
at undirvísa fulla tíð í Tórshavn og Norðurstreymoy.

**Klaverlærara**
at undirvísa 12 vikutímar í Suðuroy og 4 vikutímar í Norðurstreymoy.

**Gittarlærara**
at undirvísa 2 vikutímar í Norðurstreymoy.

**Førleikakrøv:**
Prógv frá konservatorium ella tónleikaútbúgving á sams stigi.

Setanar- og lønarviðurskifti sambært sáttmála millum Fíggjarmálastýrið og Føroya Musikkskúlalærarafelag.

Upplýsingar um størvini fáast hjá Martini Mouritsen, musikkskúlaleiðara.

Umsókn, prógv og møgulig viðmæli skulu verða okkum í hendi í seinasta lagi 13. mai 2002.

**Musikkskúlaskipanin**
Hoyvíksvegur 72
FO-100 Tórshavn
Tlf. 316462/216462 · Fax 316991
Teldupostur: martin@mms.fo

# Sethús

í Sørvági til sølu.

**Tlf. 220338**

# Skrivstovufólk

Fyri eitt av starvsfólkum okkara, sum fer í barsilsorlov, verður søkt eftir avloysara til høvuðsskrivstovuna á Toftum frá 1. juni og árið út.

Arbeiðið fevnir um alt fyrifallandi skrivstovuarbeiði í samband við uppboðssøluna. Tað er ein fyrimunur um tú hevur royndir innan skrivstovuyrkið.

# Summarferiuavloysari

Eisini sóknast vit eftir feriuavloysara til høvuðsskrivstovuna á Toftum.
Arbeiðið fevnir um alt fyrifallandi skrivstovuarbeiði.

Tað er ein fyrimunur um tú hevur royndir innan skrivstovuyrkið.

Hevur tú hug at vita meira um starvini, ert tú vælkomin at ringja á telefon 414141.

Umsókn skal sendast til

**P/F Fiskamarknaður Føroya**
**650 Toftir**

og má vera okkum í hendi innan 10. mai 2002.

# Ársaðalfundur hjá Miðvágs Bóltfelag

Lýst verður til ársaðalfundar hjá Miðvágs Bóltfelag Kristi Himmalferðardag tann 9. mai kl. 16.00. Skráin er smb. lóg felagsins henda:

1) Frásøgn frá virkif elagsins í farna ári
2) Framløga til góðkenningar av grannskoðaðum roknskapi
3) Uppskot til samtyktar
4) Áseting av limagjaldi og nær tað fellur til gjaldingar
5) Val av nevnd og tiltakslimum
6) Val av grannskoðara
7) Ymiskt

Uppskot til samtyktar á ársaðalfundi skulu vera nevndini í hendi 7 dagar fyri fundin og nevndin slær tey upp í hølum felagsins til kunningar limanna.

**Nevndin**

# Tórshavnar Listaskúli

Tórshavnar Listaskúli sýnir fram grafisk listarverk í Smiðjuni í Lítluvík

Flaggdagin 25. apríl kl. 16-18
Dýra biðidag 26. apríl kl. 14-18
Leygardagin 27. apríl kl. 14-18
Sunnudagin 28. apríl kl. 14-18

**Tórshavnar Kvøld- og Ungdómsskúli/ Tórshavnar Listaskúli**

# Musikkstevnan 2002

**Dýri Biðidagur 26. apríl**

Kl. 15.00 Stuttar útikonsertir á hesum støðum í býnum:
Við Háskúlan, við krossin Dalavegur/ Pedda við Steinsgøta og á Láarvegnum
Kl. 15.30 Skrúðgongur frá konsertstøðunum móti miðbýnum
Kl. 16.00 Konsert á Tinghúsvøllinum. Jan Christiansen borgarstjóri setur stevnuna
Kl. 19.30 Almenn kvøldseta í Norðurlandahúsinum. Umframt horn- og harmoniorkestrini, sum fara at framføra ymiskt til gaman og álvara, luttaka eisini Havnar Ungdómshornorkestur, Næmingaharmoniorkestrið hjá Musikkskúlanum og Ælabogin.

**Leygardagur 27. apríl**

Kl. 15.00 Galla konsert í Norðurlandahúsinum.
**Luttakarar verða:**
Nes Sóknar Musikkfelag
Sørvágs Tónleikarafelag/ Vestmanna Hornorkestur
Fuglafjarðar Hornorkestur
Harmoniorkestrið GHM
Havnar Hornorkestur
Tvøroyrar Hornorkestur
Klaksvíkar Hornorkestur
og stórt felagsorkestur við luttakarum úr øllum orkestrunum.

Atgongumerkir til konsertirnar í Norðurlandahúsinum, á 60 kr. fyri vaksin og 20 kr. fyri børn, eru at fáa í húsinum.

***Vælkomin til Musikkstevnuna 2002***

# Sethús í Hvalba til sølu

Við hesum verður matr. nr. 121 í Hvalba lýst til sølu.

Talan er um grundøki, vídd 843 m², við ástandandi eldri sethúsum og úthúsum.

Húsini kunnu síggjast eftir nærri avtalu.

**Suðuroyar Sparikassi**
900 Vágur
tlf. 373064












# Handilsinnbúgv

til sølu.

**Tlf. 220338**

# Prutl við skaða til sølu

**Merki:** Honda X8R-S
**Árg.:** 10/2001

Skutarin verður seldur sum hann stendur nú.

TRYGGINGARFELAGIÐ FØROYAR

Att.: Bjartur Brekkstein, sýnsmaður
tlf. 34 57 71
fax nr. 34 56 07
e-mail: bjb@trygging.fo
At hitta mánadag-hósdagin millum kl. 08.30-10.00 og fríggjadag millum kl. 08.30-16.00.

# Kunngerð

Til veljarar til løgtingsvalið týsdagin 30. apríl 2002 í Kvívíkar kommunu.

Sagt skal vera frá, at valkort eru send út við postinum til allar veljarar, sum standa á vallistanum.

Um onkur, sum heldur seg hava atkvøðurætt ikki hevur fingið valkort, ella um annað er komið skeivt fyri, skal verða sagt kommunuskrivstovuni frá sum skjótast ella seinast mánadagin (helst áðrenn kl. 15.00) 29. apríl 2002.

**Kvívíkar kommuna**

# Mjørkadal Idrætsforening

afholder

## FÆRØ MARCH
## 26. april (St. Bededag) kl. 1200

Mjørkadal Idrætsforening afholder igen i år den traditionelle FÆRØ - march. Det er i år 25. gang marchen afholdes, det vil vi gerne markere med præmier til alle der gennemfører marchen.

| | |
|---|---|
| Startsted: | FK-HOYVIK |
| Ruten: | FK/Hoyvik - Vegurin Langi - Sundsvegurin - Norðari Ringvegur - Oyggjavegur Húsareyn - Mjørkadal. |
| Forplejning: | Der vil være en ledsagebil, der medbringer kaffe, sodavand, chokolade mm. Der kan købes pølser mm. i personaleforeningens lokaler i Mjørkadal. |
| Startgebyr: | Det er gratis at deltage. Ingen tilmelding. |
| Præmie: | Der er præmie + diplom til alle der gennemfører. |

Vel mødt, MIF

veitst tú ikki tað?
Sosialurin

# Lærupláss hjá Rasmussen og Weihe

**Vit kunnu ikki lova tær pláss á landsliðnum…**

… men eftir summarfrítíðina hava vit tvey lærupláss tøk. Og hjá R&W hava vit eisini **eitt dugnaligt og væl samanspælt lið.**

At grannskoða varð fyrr mangan hildið at vera eitt keðiligt arbeiði, har ein bara sat og stardi at tølum. Í dag virkar grannskoðarin ofta sum ráðgevi, og við sínum heildarinnliti í viðurskifti kundans kann hann veita virðisskapandi ráðgeving.



Umframt at grannskoða skal grannskoðarin í dag eisini kunna geva ráð um **fígging, management, skatt, roknskap o.a.** Hetta krevur bæði praktiska og teoretiska útbúgving. Tað er eisini neyðugt at hava góðan kunnleika bæði til vinnulívið sum heild og alment virksemi og stovnar.

Jú, grannskoðan er í roynd og veru **spennandi,** og ein útbúgving hjá okkum gevur sera **góðar framtíðarmøguleikar.**

Vit bjóða tær eitt lærupláss, har tú fyrst kanst lesa HD. Tað merkir, at tú vinnur pening, samstundis sum tú fært eina hægri útbúgving.



Ætlar tú tær víðari eftir HD, **eru møguleikarnir fleiri.** Tú kanst t.d. lesa cand. merc. aud. sum sjálvlesandi, samstundis sum tú arbeiðir hjá okkum. Tú kanst eisini lesa cand. merc. aud. sum fulltíðarlesandi í Danmark - tú kanst fáa farloyvi, og kanska kunnu vit útvega tær arbeiði í lestrartíðini hjá PricewaterhouseCoopers í Danmark.

Aftan á cand. merc. aud. er møguleiki at gerast statsautoriseraður grannskoðari. Hevur tú **vilja og evni,** stuðla vit tær sjálvsagt í at fullføra tað, tú setir tær fyri.

Vit vænta, at tú hevur tikið ella tekur students-, HF- ella HH-prógv í summar, og at tú ert áhugað(ur) í eini búskaparligari útbúgving. Tú hevur hug at sameina eina teoretiska útbúgving við eina praktiska útbúgving. Eisini heldur tú tað vera spennandi at sleppa **at virka í vinnulívinum.**

Størvini skulu setast eftir summarfrítíðina, men longu nú kunnu vit gera eina setanaravtalu. Ynskir tú aðrar upplýsingar, kanst tú ringja til okkara og seta teg í samband við Ole Guldborg Nielsen ella Klaus Rasmussen.

Skrivlig umsókn við prógvum og øðrum upplýsingum skal vera okkum í hendi í seinasta lagi 27. apríl .

**RASMUSSEN & WEIHE**
STATSAUTORISERAÐ GRANNSKOÐARAFELAG P/F
An associated firm of PRICEWATERHOUSECOOPERS
Á Glaðsheyggi · Box 30 · FO-110 Tórshavn
Tel. (+298) 31 10 17 · Fax (+298) 31 10 18
E-mail: rasmussen@rasmussen.fo · http://www.rasmussen.fo